# . SÍN FRÍÐA KNØRR



*Hetta er manningin umborð á Rebekku, har Eyðfinnur Johannesen var skipari. Jan Danielsen er eisini við á myndini*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Dvørgamoy hevði júst lagt til bryggju, og her hittu vit tríggjar av manningini, Regin Debess, Símun Johannesen og Eiler Einarsson í stuttum práti.

Regin Debess segði, at hóast lotið úteftir Skálafjørðinum ikki var serliga fryskligt, og nógv fólk var í bátinum, gekk Dvørgamoy kortini einar seks sjómíl við seglum, tá byrðurin var frægastur.

Ein maður, sum eg hevði í fylgi við mær frá tí, vit fóru av Toftum, og til vit lógu við bryggju aftur á Toftum, var Jan Danielsen, sum í dag er stjóri á Heilsytrygd.

Beint áðrenn vit loystu við bátium Birgit, kom Jan av tilvild fram við, og saman vóru vit umborð á trimum bátum, til vit lógu aftur á Toftum við Høgna Jákupi.

*vilmund@sosialurin.fo*

**» Tá bátafylgið var komið út um Hulk á Strondum, fóru vit enn einaferð í ein annan bát, og hesaferð endaði vit umborð á bátinum Høgna Jákupi hjá Eyðuni Joensen**





## SIGLING

*Seglskipini og gomlu bátarnir, sum eitt nú Dvørgamoy er, eru sera hábærslig og hugtakandi á at líta. Tað var Norðlýsið, ið skipaði fyri siglingini við staðkenda toftamanninum, Villiami Hansen, umborð. Umborð á Norðlýsinum vóru tey annars væl mannaði*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*